Viðmerkingar:

# Kunningarskriv frá P/F Fjarhitafelagnum

**Innleiðing**
Við tað at ein ávís ónøgd er komin fram frá Fjarhitanevndini hjá Eigarafeløgunum um prísirnar, sum liggja til grund fyri fjarhitaveitingini hjá P/F Fjarhitafelagnum, vil nevndin koma við hesum viðmerkingum.

Uppruni felagsins stavar aftur frá 1987, tá SEV og Tórshavnar Kommuna stovna eitt felag, ið skal taka sær av fjarhitaveiting frá Brennistøðini á Sandvíkahjalla og Sundsverkinum til Tórshavnar Kommunu.

Hetta var gjørt eftir at Orkuráðið líka frá 1980 hevði arbeitt við málinum í sambandi við ætlaðu útbyggingina hjá SEV og seinni við Brennistøðini.

Hetta var mett at verða ein umhvørvisvinarlig skipan og hava ein landbúskaparligan týdning sum alternativ til at innflyta olju.

Tórshavnar Kommuna samtykti, at fyrst og fremst øki uppi í Hoyvíkshaganum skuldi verða knýtt til hesa skipan. Treytin var, at tað ikki samanlagt skuldi verða dýrari hjá brúkarunum enn, um hesir nýttu vanliga oljufýrskipan.

Hetta felag fór á húsagang, tí íløgan var ov stór í mun til tey hús, sum vórðu knýtt at skipanini. Felagið bleiv keypt aftur av Tórshavnar Kommunu og seinni kom SEV eisini uppí. Hendan meginregla, at samlaða gjaldið hjá fjarhitabrúkarunum ikki fer upp um kostnaðin at nýta oljufýr, verður framvegis nýtt.

**Íbindingargjaldið**
Endamálið við einum íbindingargjaldi er, at brúkarin skal gjalda fyri tann partin av samlaðu íløguni av fjarhitanetinum, sum hevur við fordeilingina út til brúkararnar at gera. Við at áseta eitt íbindingargjald, ávikar hetta ikki nýtslugjaldið.

Hevði hendan meginregla verið nýtt í sambandi við útbyggingina av fjarhita í Hoyvíkshaganum, hevði íbindingargjaldið verið munandi hægri enn nú.

Ístaðin valdi nevndin í upprunaliga felagnum, L/F Hitafelagið, at áseta íbindingargjaldið soleiðis, at tað í meðal svaraði til neyðuga íløgu í egið oljufýrt hitaverk, t.e. ketil, oljufýr, tanga, skorstein, pláss í kjallara ella grovkøki og neyðug rør v.m. Ráðgevarar felagsins mettu um kostnaðin og komu til tað úrslit, at sparingin var umleið 40.000 kr. og mæltu til at íbindingargjaldið skuldi verða 35.000 kr.

Hetta helt nevndin vera ov høgt, tá brúkarin eisini skuldi gjalda fyri hitaveksl-araran. Ístaðin varð gjaldið sett niður til kr. 25.000.

Prísir broytast bæði á útgerð og til egið orkuverk og til hitavekslarar, men nevndin í P/F Fjarhitafelagnum metir, at núverandi íbindingargjald framvegis er á hóskandi støði.

Tað verður umhugsað at skipa fyri felags innkeypi av hitavekslarum, soleiðis at møguligur nøgdaravsláttur kann koma kundunum til góðar.

**Nýtslugjaldið**
Nýtslugjaldið fyri fjarhita fylgir gassoljuprísinum. Tá umroknað verður frá gassoljuprísi pr. litur til málda hitanýtslu í kWh, eru tveir faktorar av týdningi.

Tann fyrri er orkuinnihaldið í olju. Upprunaliga varð orkuinnihaldið ásett sambært umrokningartalvu hjá Foreningen for Energistyring til 9,89 kWh/litur. Kanningar av orkuinnihaldinum í gassoljuni, sum seld verður í Føroyum, hava víst, at orkuinnihaldið er 10,125 kWh/litur ella 2,38% hægri enn áður mett. Hægra talið verður brúkt í umrokningini.

Seinni faktorurin er, hvussu nógv orka fæst burtur úr einum litri av olju, tá hann verður brendur í einum hitaorkuverki. Sum vituligt er, fer ein partur til spillis sum tap í skipanini. Hesin faktorurin verður vaniga nevndur nyttuvirkni.

Fjarhitafelagið hevur nýtt eitt ársnyttuvirkni fyri oljufýrd ketilanlegg upp á 0,70. Harafturat kemur elútreiðsla til oljubrennara og viðlíkahald/avskriving av ketilanleggi. Verða oman fyri nevndu viðurskifti tikin við í roknaða ársnyttuvirki fyri 1999, verður hann 0,78 fyri sethús og 0,81 fyri randarhús. Ósemja hevur verið um, hvussu stórt tapið er. Ikki er óhugsandi, at nýmótans hitaverk í dag hava betri nyttuvirkni, men tað kann ikki neyvt og endaligt ásetast. Hetta verður kannað nærri.

Semja er við Fjarhitanevndina um útrokningarháttin av meðaloljuprísinum á føroyska marknaðinum.

Samanumtikið má tó sigast, at fjarhitabrúkararnir ikki gjalda ov nógv. Hetta sæst eisini á meðaltølum, sum lýst niðanfyri.

**Meðaltøl fyri nýtslugjald og fast gjald**
Vit hava, síðan felagið byrjað at virka, gjørt hagtøl yvir meðalnýtslu fyri teir ymisku húsabólkarnar. Meðaltølini eru fyri hús, sum hava verið íbundin fjarhita í eitt ár og meira. Húsini eru bólkað í býlingar har húsini standa, og um tey eru sethús ella randarhús.

Meðaltølini fyri teir ymisku býlingarnar og húsasniðini vóru fyri 1999: *Sí talvu* I.

**Oljuprísir**
Okkara gjald fylgir gassoljuprísinum hjá P/F Shell.

Vit hava frá byrjan fingið gassoljuprísirnar frá P/F Shell sama dag teir eru komnir í gildi. Prísbroytingarnar eru skrásettar á teldu, soleiðis at meðalprísurin á fjarhita er tøkur fyri alt tíðarskeiðið.

Gassoljuprísurin lá frá á heysti 1993 til á heysti 1996 millum 2,70 og 2,90 krónur/litur, tá ið hann hækkaði til 3,15 krónur/litur og lá annars um tríggjar krónur/litur fram til á heysti 1997. Á heysti 1997 tók oljuprísurin at falla, til hann fram móti jólum 1998 var komin niður á 2,56 krónur/litur.

Síðan tá er prísurin hækkaður, til hann tann 21/9-2000 var komin upp á 4,76 krónur/litur. Prísurin er í dag 4,56 krónur/litur. *Sí hjáløgdu strikumynd yvir oljuprísir.*

Skiftandi oljuprísurin gevur hesar meðal árligu oljuprísir:
1995: 2,715 kr./litur
1996: 2,926 kr./litur
1997: 3,005 kr./litur
1998: 2,747 kr./litur
1999: 2,870 kr./litur

Meðal árligi fjarhitaprísurin var:
1995: 39,2 oyru/kWh
1996; 43,2 oyru/kWh
1997: 43,3 oyru/kWh
1998: 38,8 oyru/kWh
1999: 40,5 oyru/kWh

Meðal oljuprísurin í ár hevur higartil verið 3,72 kr./litur. Um dagsprísurin heldur sær á sama støði árið út, verður meðalprísurin 3,90 kr./litur.

Tilsvarandi kWh prísir fyri fjarhita verða sostatt 52,4 oyru/kWh til í dag, og um oljuprísurin heldur sær á sama støði árið út, verður meðalprísurin fyri fjarhita í ár 55,1 oyru/kWh, sum er 36% hægri enn í 1999.

**Ákontogjøld og nýtsluuppgerð**
Tá nýggir brúkarar verða bundnir í fjarhitaskipanina, er høvuðsreglan tann, at nýtslan fyrsta árið verður mett sum meðalnýtsla hjá sama húsabólki – sethús ella randarhús í sama býlingi. Tá brúkar hevur verið íbundin í eitt ár ella meira, nýta vit nýtsluna hjá brúkarunum í undan farna ári sum grundarlag.

KWh-prísurin, ið nýttur verður til ákontogjøldini, er meðalprísurin fyri undanfarna ár.

Við árslok verður orkumátarin avlisin og nýtslu uppgerð send til brúkaran. Tann fyrri parturin av uppgerðini er ein uppgerð yvir fjarhitanýtsluna fyri farna ár, og tann seinni parturin er eitt yvirlit yvir mett mánaðarlig ákontogjøld fyri komandi ár.

Um brúkarin, vegna serstakar umstøður, ynskir síni ákontogjøld broytt, er møguleiki fyri hesum.

Vónandi lýsir hetta skriv nakrar av teimum ivaspurningum, sum verið hava.

*Tórshavn 13. oktober 2000*
**P/F Fjarhitafelagið**

Talva I

| Bólkur | Nýtslugjald/mánaðin | Fast gjald/mánaðin |
|---|---|---|
| Millum Gilja, randarhús | kr. 618,00 | kr. 40,00 |
| Lítla Gil, sethús | kr. 875,00 | kr. 40,00 |
| Inni á Gøtu, sethús | kr. 829,00 | kr. 40,00 |
| Inni á Gøtu, randarhús | kr. 595,00 | kr. 40,00 |
| Eystan Gil, sethús | kr. 814,00 | kr. 40,00 |
| Við Løgmannabreyt, randarhús (bert 6 hús) | kr. 431,00 | kr. 40.00 |






# Royn teg sum alara á Giljanesi

*Á árliga SÍF tiltakinum í ítróttarhøllini á Giljanesi sleppa fólk millum annað at fóðra síl og gita, hvussu nógv ein laksur vigar*

EDVARD JOENSEN

Tú kanst royna at gita, hvat ein laksur, sum svimur í einum kari vigar. Og tú kanst sleppa at fóðra síl í einum øðrum kari. Umframt øll tey vanligu tilføkini, sum plaga at vera, tá ítróttarfeløgini samla pening til raskturin.

Afturvendandi SÍF tiltakið í ítróttarhøllini á Giljanesi verður komandi sunnudag. Byrjað verður klokkan 16.00 seinnapartin, og hildið verður á til klokkan 22.00.

Tiltakið byrjar við mótasýning klokkan 16.00. Beint eftir mótasýningina byrjar eydnuhjól, sum fer at halda fram, alla tíðina, meðan opið er. Eisini verða onnur vanlig tiltøk so sum fiskibrunnur, bóltkast og matsøla, meðan opið er.

Klokkan 17.00 byrjar køkutombola. Sandavágskøkurnar eru tiltiknar, og vanligt er, at kappast verður um, hvør letur vakrastu og flottastu køkuna. Sigast skal tó, at tær koma kortini ikki bara úr Sandavági. Tað kemur meira enn so fyri, at onkur er úr øðrum bygdum í Vágum. Samstundis sum køkurnar verða sýndar fram, áðrenn tombola sølan byrjar, ber til at atkvøða um vakrastu køkuna, sum er at vinna. Úrslitið av teirri kappingini verður kunngjørt, tá tiltakið endar klokkan 22.00.

Klokkan 19.00 fer Ragnar í Vík á pallin at syngja country & western. Kendasti føroyski cowboysangarin tykist væl umtóktur í Vágum eins og aðrastaðni. Hann hevur fyrr, við góðari undirtøku, sungið til líknandi tiltak á Giljanesi.

Klokkan 19.30 verður ein rættiliga áhugaverd framsýning. Eitt slag av mótasýning, ber til at siga.

Tá fara fólk at sýna fram brúðarkjólar frá 1950 til dagin í dag. Eisini verða leikarabúnarnir hjá SÍF upp gjøgnum tíðirnar vístir fram á pallinum. Til ber so at sammeta gamla brúðar- og ítróttarmótan við tað, sum brúkt verður í dag.

Sum sagt verður eisini ymiskt, sum hevur samband við alivinnuna, at síggja á SÍF tiltakinum á Giljanesi sunnudagin.

Alla tíðina, tiltakið varir, fara kør við livandi fiski at standa í høllini. Í einum kari fer ein livandi laksur at ganga. Fólk kunnu so keypa ein seðil, har tey skriva á, hvat tey halda, at laksurin vigar. Tann, sum er næstur nágreiniligu vektini á fiskinum, vinnur fiskin. Úrslitið verður kunngjørt, tá tiltakið endar klokkan 22.00 um kvøldið.

Í einum øðrum kari fara síl at ganga. Nógv síl. Har kunnu fólk keypa alifóður, sum tey so geva sílunum. Síl er rættiliga lívligur fiskur, og stuttligt er mangan at síggja, hvussu tey kappast um at vera fyrst á fóðrinum, sum tveitt verður fyri tey.

Eisini verður ein myndarøð sett upp saman við fiskakørunum. Hetta eru myndir, sum tiknar eru á eini alistøð og sum vísa gongdina í laksaalingini. Myndarøðin og alikørini standa uppi alla tíðina, opið er.


*Árliga SÍF-tiltakið fyri at samla pening til ítróttin í Sandavági verður sunnudagin* *Mynd: Edvard Joensen*

# Tann brávakra hugsjónin

*Greinar og fyrilestrar eftir Hanus Kamban út í bók*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Herfyri gav Mentunnargrunnur Studentafelagsins út bók eftir rithøvundan Hanus Kamban, har greinar og fyrilestrar hjá hesum eru prentaðir.

„Hvat samband er ímillum sovjetiska ríkið og tað messiasríki, sum Jan Bockelson - betur kendur sum Jón úr Leyden - setti á stovn í Munster í Týsklandi í 1534? Hvørji sjónarmið hevði skaldið J.H.O. Djurhuus um mentunarligt og politiskt framsóknií Føroyum? Hvat slag av hugburði býr undir føroyskari stremban - í breiðastu merking - um vit fara eitt sindur niður um vatnskorpuna?

Tann brávarka hugsjónin er eitt savn av greinum, fyrilestrum og ritroyndum, har roynt verður at narkast hesum spurningum. Bókin tekur upp so ymisk evnir sum mentan, søgu, bókmentir, politikk, undirvísing, landsløg, bibliofila trá. Seinasta greinin í bókini viðger tær fíggindamyndir, sum eftir kreppuna í nítiárunum gjørdi vart við seg í donskum fjølmiðlum.“

Soleiðis verður skrivað á baksíðuni á bókini og hetta er í stuttum tað „Brávakra hugsjónin“snýr seg um.


*Hanus Kamban*

Hanus Kamban er høvundurin, sum dugir at fanga lesaran. Hann er rithøvundurin, sum kannar djúpt eitt evni, áðrenn hann skrivar um tað, og hansara viðfødda forvitni kemur lesaranum til góðar. At Hanus eisini torir væl at tamba føroyska málið burturúr mangan stirvnu leguni, er ein fyrimunur hjá lesaranum.

Hanus Kamban gav fyrstu bókina út í 1980 og síðan eru sjey komnar aftur at. Millum bókaútgávurnar hevur hann verið ein rættuliga virkin kronikkskrivari og uttan hetta virksemið høvdu vit neyvan sæð seinastu bókina „Tann bráðvakra hugsjónin“.

Viðmerkingar:

# Førleikaskerd í arbeiði

Endamálið má vera at koma arbeiðstarnaðum til hjálpar við framleiðslu og annars at hjálpa avlamnum til arbeiðis:

a) at royna arbeiðsevnini hjá arbeiðstarnaðum við atliti til meting um møguleikar (arbeiðs/vinnuroyndir) hjá tí einstaka at arbeiða,
b) at menna arbeiðsmøguleikarnar hjá arbeiðstarnaðum sum heild,
c) at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurútbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunnu fara til arbeiðis,
d) at skipa fyri fakligari útbúgving handaliga ella bókliga av arbeiðstarnaðum,
e) at skipa fyri vinnuligum vardum arbeiði fyri avlamnum, sum ikki hava førleikan at arbeiða í vanligari vinnu,
f) at stuðla arbeiðstarnaðum at fáa til vega tilfar til at virka og til at selja vørur, tey virka.

Hendan vinnan eigur ikki at geva óhóskandi kapping. (Leysliga endurgivið úr ALV-viðtøkunum).

Serliga umráðandi verður, at øll medvirka at betra um hugburðir, ið skapa praktiskar loysnir, og slætta vegin hjá vanligum vinnurekandi í góðum hýri at taka vinnuskerd fólk í arbeiði. Tá ið vinnurekandi fáa nyttu og gleði av teimum vinnuskerdu, tá fer arbeiðsgleðin so sanniliga at ganga báðar vegir! Eitt tilfeingið sum fá hildu vera trúligt kann vakna!

Vónandi taka øll sum eru uppstillaði hetta økið til sín sum sítt hjartamál. Tá er vón um at býráðið íðiliga fer til verka. Ein partur kann verða at sýna teimum vælvild, sum serliga arbeiða fyri økinum. Til dømis við at vísa á ítøkiligar møguleikar sum kommunan hevur og er sinnað til at luttaka í.

**Jónas Johnsson**
**valevni hjá**
**Sjálvstýrisflokkinum**

# Friður!?

Fyri nøkrum árum síðani segði ein arbeiðsfelagi við meg, Ísrael, Ísrael og aftur Ísrael at hoyra í tíðindunum, eg segði við hann, at tú kemur framvegis at hoyra meir um hettar landið í framtíðini og tað vísir seg at tosað verður um friðarsamráðingar við Palestina, ið ferð eftir ferð bresta. Hettar er í mínum oyrum positivt, lesa vit í 1. Tess.br. kap. 5, vers 3 stendur: Tá ið tey siga Friður og eingin vandi! – tá kemur bráður undirgangur á tey, eins og verkir á barnakonu og tey skulu als ikki sleppa undan. (Hettar er um dag Harrans).

**Vinarligast**

**Pól Hans Jákup Debes**